




## Leiðari til Margarinfabrikkina

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara, fyri leiðara í farloyvi, at arbeiða 40 tímar um vikuna til frítíðar- og virkishúsið Margarinfabrikkina at byrja 1. januar 2007 ella eftir nærri avtalu. Farloyvistíðin er frá 1. januar 2007 til 31. desember 2007.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Vit vænta, at tú**
- hevur útbúgving sum pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemið í Margarinfabrikkini
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði.
- ert røkin
- ert framsøkin
- er opin fyri møguligum bygnaðarbroytingum

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Frígerð Sundsskarð, deildarleiðara, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. desember 2006. Viðmerkið umsóknina „Leiðari til Margarinfabrikkina".

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**






## Løgfrøðingur

Tórshavnar kommuna søkir eftir løgfrøðingi til spennandi starv á stjórnarskrivstovuni.

**Starvið**
Sum løgfrøðingur ráðgevur tú borgarstjóra, stjórn og starvsfólki, og tú ert við til at menna mannagongdir og fyrisitingarliga førleikan í kommununi. Í ávísan mun málsviðger tú og samskiftir við borgarar, virkir og myndugleikar, í serligum málum, ið eru latin stjórnarskrivstovuni at avgreiða.

Tórshavnar kommuna bjóðar tær eitt starv í einum spennandi og dynamiskum umhvørvi, við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tvørfakligum uppgávum, ið geva tær góðar møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Setanin**
Sum umsøkjari mást tú hava lokið løgfrøðisligt embætisprógv. Vit ynskja, at tú hevur viðkomandi royndir og helst innan almenna fyrisiting. Tú mást duga væl at samskifta og samstarva bæði innan- og uttanhýsis.

Vit seta starvið skjótast til ber og løna sambært sáttmálanum millum BLF og FMR. Vit kunnu bjóða setan sum ráðgevi, um førleikin og royndirnar eru til tess. Vit bjóða eisini skeið og eftirútbúgving.

Vit kunnu greiða tær meira frá starvinum, um tú ringir til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, tlf. 302010. Tú kanst eisini spyrja okkara fráfarandi løgfrøðing Eyðbjørn Larsen.

**Umsókn**
Tiltalar hetta teg, so send eina umsókn saman við viðmælum og prógvum til Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn. Umsóknin skal vera okkum í hendi seinasta lagi 4. januar 2007.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**




